17. januar 2011
Mál: 11/00005-3
Tygara skriv:
Málsviðgerð: EØ

# Uppskot

# til

# løgtingslóg um bygging av bygningum o.a. ( Byggilógin )

*Skynsamilig bygging*

**§ 1.** Endamálið við lógini er at tryggja, at bygningar verða bygdir á skynsaman hátt og samsvarandi góðari venju innan byggivinnuna.
*Stk. 2.* Bygningar skulu byggjast so teir í mun til heilsu-, trygdar- og umhvørvis-viðurskifti lúka lógásett krøv og onnur krøv, sum eru heimilaði eftir lóggávuni, eitt nú sum fyrisett mát ella sum ítøkiligar treytir fyri byggingini.

**§ 2**. Bygging í § 1 fevnir um nýbygging, umvæling, umbygging, afturatbygging umframt broyting í nýtslu av bygningum.
*Stk. 2.* Bygningar sambært stk. 1 eru umframt bústaðarbygningar, eisini aðrir bygningar, sum verða nýttir til vinnuendamál, fyrisiting, at hýsa tænastur til almenningin og tílíkt.
*Stk. 3.* Lógin fevnir eisini um niðurtøku av bygningum.
*Stk. 4.* Bygningur, hvørs grundarsteinur er lagdur, áðrenn lógin kom í gildi, er ikki fevndur av lógini. Hetta er tó ikki galdandi fyri umbygging, umvæling og tílíkt., í førum har søkt verður um byggiloyvi eftir, at lógin kom í gildi.
*Stk. 5.* Brýr, tunlar, grótlaðingar og onnur bygging ella uppsetan av tjøldum og øðrum, sum verða nýtt til onnur endamál enn at hýsa fólki í longri tíðarskeið, eru ikki fevnd av hesi lóg.

**§ 3.** Landsstýrismaðurin kann, til tess at varða um heilsu-, trygdar- og umhvørvisviðurskifti í sambandi við bygging eftir hesi lóg, áseta neyvari reglur fyri bygningar, heruppií reglur um:
1) Brunaviðurskifti, so vandin fyri og avleiðingarnar av eldsbruna verða avmarkaðir mest møguligt,
2) Heilsuviðurskifti, so inniluft, tilfarsnýtsla og tílíkt ikki elvir til heilsuvanda,
3) Atkomuviðurskifti, so fólk, ið bera brek, eisini fáa lætta atkomu at bygningum, ið eru ætlaðir almenninginum,
4) Orkuviðurskifti, so sleppast kann undan orkuspilli til eitt nú upphiting, luftskifti o.a.
5 ) Berandi bygningslutir og byggitilfar, so bygningurin er nóg sterkur og tryggur, og
6 ) Innleggingar, so tær ikki eru til ampa fyri fólk, bygningin ella umhvørvið.

**§ 4.** Kommunan kann, við góðkenning frá landstýrismanninum, í ávísum førum, loyva frávik frá ásetingunum í hesi lóg.

*Umsókn um bygging*

**§ 5**. Umsókn um loyvi at byggja skal sendast kommunala byggimyndugleikanum.
*Stk. 2.* Umsóknin skal vera skrivlig, og hjálagt skulu vera allir viðkomandi upplýsingar um bygginina, so sum:
1) Eyðmerking av bygningi,
2) Umsókn um frávik, um so er at ætlaða byggingin gongur ímóti ásetingum í hesi lóg ella kunngerðum, ásettar við heimild í lógini ella ímóti ásetingum í galdandi byggisamtykt fyri økið og
3) Upplýsingar um, hvat bygningurin verður ella fer at verða nýttur til.
*Stk. 3.* Kommunali byggimyndugleikin kann umframt upplýsingar sambært stk. 2, áseta krøv um aðrar upplýsingar, sum hava týdning fyri viðgerð av umsóknum.

**§ 6.** Ásetingar í hesi lóg ella ásetingar settar í gildi við heimild í hesi lóg, skúgva ikki til viks ásetingar í góðkendari byggisamtykt um formkrøv til umsóknir, íbinding o.a., men koma afturat staðbundnu ásetingunum, sambært. stk. 2.
*Stk. 2.* Byggifyriskipandi ásetingar í góðkendum byggisamtyktum fara úr gildi so hvørt sum kunngerðir verða settar í gildi eftir hesi lóg.

**§ 7.** Ikki kann farast undir at byggja, fyrr enn skrivligt byggiloyvi er fingið til vega frá kommunala byggimyndugleikanum.
*Stk. 2.* Um farið verður undir at byggja, áðrenn byggiloyvi sambært stk. 1 fyriliggur, kann kommunan geva boð um at steðga byggingini.
*Stk. 3.* Eitt byggiloyvi kann verða býtt í partar, um byggimyndugleikin metir, at byggingin kann byrja, uttan at endalig greiða er fingin á øllum viðurskiftum ella stigum í byggingini.
*Stk. 4.* Útskrivar byggimyndugleikin eitt treytað byggiloyvi, skal tað í loyvinum týðuliga verða ásett, hvørji krøv og treytir talan er um við tilvísing til heimildargrundarlagið.
*Stk. 5.* Byggingin skal byrja í seinasta lagi 2 ár eftir, at byggiloyvið er latið. Er byggingin ikki byrjað innan ásettu tíð, fellur byggiloyvið burtur.
*Stk 6.* Kommunali byggimyndugleikin kann í byggiloyvinum áseta freist fyri, nær byggingin skal verða liðug.

**§ 8.** Kravið um byggiloyvi frá kommunala byggimyndugleikanum og treytirnar í § 5 stk. 2, eru eisini galdandi í teimum førum, har eingin góðkend byggisamtykt er.

*Eftirlit*

**§ 9.** Kommunali byggimyndugleikin hevur eftirlitið við, at ásetingarnar í lógini og reglur og treytir, ásettar við heimild í lógini og kunngerðum, verða hildnar.
*Stk. 2.* Fyri at fremja eftirlitið hevur kommunan og løgreglan, við at vísa hóskandi samleikaprógv, uttan rættarúrskurð atgongd til allar bygningar, ið eru fevndir av hesi lóg.

**§ 10**. Eigarin av bygninginum skal beinanvegin boða eftirlitsmyndugleikanum frá, tá arbeiðið at byggja, umbyggja, umvæla ella at broyta ein bygning er liðugt, so at eftirlitið sambært hesi lóg kann vera framt.
*Stk. 2.* Kommunan fremur eftirlitið við sýning.
*Stk. 3.* Sýning sambært stk. 2 skal byrja, áðrenn tað, sum bygt, umbygt, umvælt ella broytt er, verður tikið í nýtslu, og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at fráboðan um liðugtgerð sambært. stk. 1 er latin eftirlitsmyndugleikanum.

**§ 11.** Tað er skylda eigarans at rætta tey viðurskifti í bygninginum, sum ganga ímóti ásetingunum í hesi lóg, ella ímóti ásetingum ásettar við heimild í hesi lóg.

**§ 12.** Verður eftirlitsmyndugleikin varugur við bygning, sum vegna týðandi feilir og manglar má metast at vera til ampa ella skaða fyri tey, sum bygningurin hýsir ella onnur, kann eftirlitsmyndug-

leikin geva eigaranum boð um, at bygningurin ikki kann nýtast, fyrr enn bøtt er um hesar feilir og manglar. Verður ein avgerð um nýtslubann eftir hesi áseting kærd, hevur kæran ikki steðgandi virknað við sær.
*Stk. 2.* Fylgir eigarin ikki boðum sambært stk. 1, kann eftirlitsmyndugleikin skipa so fyri, at bøtt verður um feilir og manglar í bygninginum fyri eigarans rokning.

§ **13.** Tað, ið bygt, umbygt, umvælt ella broytt verður, kann ikki takast í nýtslu fyrr enn sýning er framd av eftirlitsmyndugleikanum.
*Stk. 2.* Eftirlitsmyndugleikin útskrivar nýtsluloyvi, tá tað við sýning kann staðfestast, at tað, ið bygt, umbygt, umvælt ella broytt er, ikki gongur ímóti ásetingunum í hesi lóg ella ímóti ásetingum ásettar við heimild í hesi lóg.
*Stk. 3.* Eftirlitsmyndugleikin kann geva fyribils nýtsluloyvi í førum, har øll byggingin, umbyggingin, umvælingin ella broytingin enn ikki er liðug, um mett verður, at hetta ikki er til ampa ella skaða fyri tey, ið skulu gera brúk av bygninginum ella onnur.
*Stk. 4.* Fyribils nýtsluloyvi sambært stk. 3 er tó treytað av, at eigari hevur váttað, at tað, sum higartil er bygt, umbygt, umvælt ella broytt, ikki gongur ímóti ásetingum í hesi lóg ella ásetingum ásettar við heimild í hesi lóg.

§ **14.** Staðfestir eftirlitsmyndugleikin, at tað sum bygt, umbygt, umvælt ella broytt er, ikki lýkur ásetingar í hesi lóg ella ásetingar ásettar við heimild í hesi lóg, skal eftirlitsmyndugleikin geva eigaranum boð um at fáa hesi viðurskifti í rættlag innan ávísa freist.
*Stk. 2.* Um staðfestast kann, at viðurskiftini ikki eru fingin í rættlag eftir at freistin sambært stk. 1 er farin, kann eftirlitsmyndugleikin áseta nýggja freist.
*Stk. 3.* Um eigari ikki fylgir boðum, ið eru givin sambært stk. 1 og stk. 2, kann tað við dómi áleggjast honum at fáa tey viðurskifti, sum ganga ímóti ásetingunum í hesi lóg ella ásetingar ásettar við heimild í hesi lóg, í rættlag.

*Gjald*

§ **15.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um gjald fyri endurrindan av útreiðslum, sum myndugleikar hava í sambandi við umsiting av og eftirliti við hesi lóg og reglum ásettar við heimild í lógini.

*Kæra*

§ **16.** Avgerð tikin við heimild í hesi lóg, kann, har annað ikki er ásett, innan 4 vikur, rokna frá tí degi at avgerðin er tikin, kærast til Kærunevndina í lendismálum.
*Stk. 2* Ein kæra hevur, har annað ikki er ásett, steðgandi virknað við sær.
*Stk. 3.* Avgerðir, sum Kærunevndin í lendismálum tekur í málum eftir hesi lóg og reglum, ásettar við heimild í lógini, eru endaligar innan fyrisitingina.

*Revsing*

§ **17.** Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður tann revsaður við bót, sum brýtur § 7, stk. 1, § 7, stk. 5-6, § 10, stk. 1, § 11 og § 13, stk. 1.
*Stk. 2.* Í reglum, sum eru ásettar við heimild í § 3, kunnu verða ásettar reglur um revsing við bót.
*Stk. 3.* Um bygningur er bygdur á ein hátt, sum gongur ímóti reglum í hesi lóg ella ímóti reglum, ásettar við heimild í hesi lóg, verður tann, sum hevur latið bygningin byggja, ella tann, sum hevur staðið fyri byggingini, revsaður við bót. Tann, sum staðið hevur fyri byggingini uttan at eiga bygningin, verður bert revsaður um staðfestast kann, at viðkomandi visti ella átti at vita, at byggingin ikki er gjørd í samsvari við lógásett krøv og í samsvari við góða venju innan byggivinnuna.
*Stk. 4.* Við bót verður tann revsaður, sum framleiðir byggitilfar og annað tilfar, ið

nýtast skal innan bygging, um tilfarið ikki lýkur krøv, ásett við heimild í hesi lóg.
*Stk. 5.* Feløg v.m. (løgfrøðiligir persónar) kunnu koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

§ **18.** Landsstýrismaðurin ella tann, ið landsstýrismaðurin heimilar, kann í málum um brot á reglur, ásettar við heimild í § 3, við einum sektaruppskoti boða frá, at málið kann verða avgjørt uttan rættarmál, um tann, ið hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar at vera til reiðar at gjalda bótina sambært sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist. Eftir áheitan kann landsstýrismaðurin ella tann, ið landsstýrismaðurin hevur heimilað, leingja freistina.
*Stk. 2.* Stk. 1 verður samsvarandi nýtt í málum um brot á § 7, stk. 1, § 7, stk. 5-6 , § 10, stk. 1, § 11 og § 13, stk. 1.
*Stk. 3.* Reglurnar í rættargangslógini um krøv til innihaldið í ákæruritum og reglurnar um, at ein ákærdur ikki hevur skyldu at geva frágreiðing, verða samsvarandi nýttar viðvíkjandi sektaruppskotum.
*Stk. 4.* Góðtekur tann, ið hevur framt brotið, bótina, fellur rættarsóknin burtur.

§ **19.** Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um støðd av bótum givnar við heimild í § 17 og § 18.
*Stk. 2.* Bótastøddin kann hækkast munandi, um ólógliga byggingin er framd við vilja ella av ósketni og tað við ólógligu byggingini er fingin peningaligur fyrimunur, ella tílíkur fyrimunur hevur verið tilætlaður fyri eigaran sjálvan ella onnur, eitt nú við sparingum.

*Gildiskoma*

§ **20.** Henda lóg kemur í gildi 1.august 2011.

Innlendismálaráðið xx.xx.xx

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at áseta felags reglur um bygging, so framtíðar bygningar lúka nútímans góðskukrøv og krøv til heilsu, trygd og umhvørvi. Ein slík betran kemur í síðsta enda borgaranum, tí sum byggir og samfelagnum til góða.

Sum er, hava vit ikki nakra sonevnda landsbyggireglugerð í Føroyum. Hetta hevur við sær, at bygging sum heild ikki er fevnd av nøkrum krøvum til eitt nú bjálving, innlegging, orkunýtslu o.a. Hissini ásetingar um bygging finnast tó í ávísan mun í góðkendum kommunalum byggisamtyktum umframt í serlóggávu. Hesar ásetingar eru tó ikki gjørdar fyri at tryggja eina ávísa góðsku í byggingini og taka heldur ikki hædd fyri at samansjóða krøvini til bygningar, so at krøvini innan heilsu, trygd og umhvørvi kunnu sigast at sampakka. Eitt savnað regluverk verður mett at vera ein kærkomin nýskipan og stórt framstig, sum serliga byggivinnan, ráðgevandi verkfrøðingar, arkitektar og kommunalir byggimyndugleikar hava eftirlýst í áratíggju. Lógaruppskotið er tí ein neyðugur grundarsteinur undir savnandi bygningsregluverkinum, sum verður ásett í kunngerð.

Við heimild í hesi lóg verða fyrst fleiri kunngerðir settar í gildi innan tey ymisku økini, sum viðvíkja bygging, fyri síðani, tá allar kunngerðirnar eru gjørdar, at verða savnaðar í eitt regluverk álíkt eitt nú danska "Bygningsreglementet 2008", nú "BR10. ". Tættir í nýggja bygningsregluverkinum fara at snúgva seg um innrætting, orkunýtslu, innileggingar, brunaviðurskifti, berandi bygningslutir o.a.m. Savnaða bygningskunngerðin verður stýrandi fyri øll, sum lata bygningar byggja, umvæla o.s.fr., tað verið seg einstaklingar, fyritøkur og myndugleikar.

**Ummæli :**

Lógaruppskotið hevur verið til hoyringar hjá hesum: Agenda 21, Arbeiðseftirlitinum, Arkitektafelagi Føroya, Brunaumsjón Landsins, Býarskipanarnevndini, Byggiharrasamtaki Føroya, Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu, Føroya Byggifrøðingafelagi, Føroya Handverkarafelagi, Føroya Handverksmeistarafelagi, FKF, KSF, Føroya Lærarafelagi, Føroya Tekniska Lærarafelagi, Føroya Verkfrøðingafelagi, Hjálpitólarmiðstøðini, ÌSF, ÍSB, Kærunevndini í lendismálum, Landsfelagi Handverkaranna, Landsverki, MBF, Føroya Pedagogfelagi , Posta, Ráðgervarafelagnum, Vinnuhúsinum, TRYGD, Tryggingarfelagnum Føroya, Húsalansgrunninum, Farhouse, EM-ráðgevingini, Leigunevndini, Kramm.fo, Verkætlanarbólkinum.

Umframt hetta er uppskotið eisini sent til allar kommunur og øll aðalráð og hevur Innlendismálaráðið heitt á aðalráðini um at skipa so fyri, at eisini stovnar undir teim ymisku ráðum, sum møguliga hava viðmerkingar til uppskotið, fáa tað tilsent.

Uppskotið hevur eisini ligið frammi á heimasíðuni hjá Innlendismálaráðnum.

Uppskotið til byggilóg, sum fyrru ferð varð sent í almenna hoyring í 2010, er broytt grundleggjandi í mun til eftirlitsmyndugleikan. Kommunurnar gjørdu í fyrru hoyringini vart við, at tær meta seg verða førar fyri at hava tað eftirlit, sum havast skal við bygningum eftir hesi lóg og at tað ikki nýtist at vera ein stovnur undir landinum, sum fremur eftirlitið. Bæði á hoyringsfundinum og í viðmerkingunum vístu kommunurnar eisini á, at eitt bygningseftirlit, sum byggir á ítøkiliga sýning av øllum bygningum heldur enn eina skipan við sýnisváttan og stakroyndum, er eitt framstig, sum

betur tryggjar, at endamál lógarinnar verður rokkið. Hetta er tikið til eftirtektar í hesum lógaruppskotinum.

**Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**Fíggjarligar avleiðingar**
Lógaruppskotið fær fíggjarligar avleiðingar fyri ein og hvønn, sum skal byggja, við tað at tað við heimild í hesi lóg verða gjørdar reglur um eitt nú tetting og bjálving. Sostatt verða framtíðar íløgur í bygging eitt vet hægri, men meirútreiðslan vil í stóran mun javnast aftur í dygd og rakstrarsparingum, eitt nú tí at húsini frameftir verða betur bjálvaði.

Lógaruppskotið fær ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri landið, annað enn í teimum førum, har landið byggir, sí viðmerkingarnar omanfyri.

**Umsitingarligar avleiðingar**
Mett verður, at lógaruppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar, sum partvíst standast av kunngerðasmíð, kæruviðgerð, eftirlit og umsiting av lógini og serliga teimum kunngerðum, sum koma í gildi við heimild í hesi lóg. Tað eru serliga kommunurnar, sum fáa økta arbeiðsbyrðu í sambandi við framtíðar byggimálsviðgerð og eftirliti við, at regluverkið verður hildið.

**Umhvørvisligar avleiðingar**
Mett verður, at reglur innan bygging ikki hava negativar avleiðingar fyri umhvørvið. Hinvegin hava reglurnar gagnligt árin á umhvørvi, tí bygging frameftir fer at koma undir krøv um upphiting, eginleikar í byggitilfari o.a.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar við sær í mun til altjóða avtalur og reglur. Lógaruppskotið fremur altjóða ST-sáttmálan fyri tey, ið bera brek, tí reglur eru um innrætting og atkomuviðurskifti.

**Sosialar avleiðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær sosialar avleiðingar.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ Felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

Lógin er ætlað sum karmur um ítøkliga regluásetan av krøvum til bygging av bygningum eins og til dømis lógin um trygd á sjónum er karmur um ítøkiliga regluásetan av krøvum til skip og bátar og lógin um kolvetnisvirksemi er karmur um ítøkliga regluásetan av krøvum til boripallar, boriskip o.t.

**Til § 1**
Í stk. 1 er aðalkravið til framtíðar bygging ásett. Allir bygningar skulu byggjast á skynsaman hátt og samsvarandi góðari byggivenju. Talan er um eitt sonevnt dynamiskt krav. Í tí liggur, at lógin eisini rúmar framtíðar broytingum innan byggitøkni, byggitilfar, byggistandardir o.t. At víst verður til góða venju innan byggivinnuna er eisini eitt dynamiskt krav. Byggisiðir og byggihættir eru broytiligir. Innan byggivinnu kann ein, eins og innan aðrar vinnur, til hvørja tíð staðfesta, hvat góð byggisiðvenja er.

Í stk. 2 er vavið í lógini ásett. Lógin fevnir um heilsu-, trygdar- og umhvørvisviðurskifti, sum eru tengd at einum bygningi. Við øðrum orðum, so er bygging av einum bygningi miðdepilin í hesi lóg og tí heimilar lógin eisini allar tær reglur, sum skulu setast í gildi, fyri at ein bygningur kann sigast at verða bygdur á skynsaman hátt. Ein skynsamur bygningur tekur atlit at heilsuviðurskiftum, so at eitt nú inniluftin er góð; at trygdarviðurskiftum, so byggitilfar, byggisnið o.a. ikki er skaðiligt ella ótrygt fyri tey, sum brúka bygningin; at umhvørvisviðurskiftum, so eitt nú innleggingar og orkunýtsla er í samsvari við fyrisett mát.

**Til § 2.**
Ásetingin lýsir í stk. 1, hvat hugtakið bygging fevnir um. Bæði nýbygging og onnur bygging, er fevnd av lógini.

Í stk. 2 er ásett, hvørjar bygningar lógin fevnir um. Talan er um ymisk sløg av bygningum: sethús, tvíhús, raðhús og størri bygningar o.a., óansæð um tað eru privatfólk, kommunur, landið, feløg ella vinnurekandi, ið lata hesi byggja.

Lógin fevnir eisini um summarhús. Vísandi til, at summarhús verða nýtt at hýsa fólki og at tað ikki í Føroyum er vanligt at seta avmarkingar fyri mest loyvdari nýtslu av summarhúsum, verður tað mett neyðugt at seta krøv til, at summarhús eisini verða bygd á fullgóðan hátt í mun til upphiting, innlegging, trygdar- og heilsuviðurskifti o.s.fr.

Gisitingarhús, sjúkrahús, kirkjur, leikhús, skrivstovubygningar, sambýli, og aðrir bygningar, sum hýsa handlum, matstovum, barnagørðum, undirvísingartænastum, undirhaldi, framsýningum, upphitaðum goymslubygningum o.ø. bygningum, eru eisini fevndir av lógini. Eisini fyribilsbygningar, sum eru ætlaðir at hýsa fólki, t.d., skálar, eru fevndir av lógini.

Bygging í § 2 er avmarkað til bygningar og onnur bygningsverk, sum eru ætlaði at hýsa fólki í longri tíðarbilum. Uppsetan av tjøldum o.t. eru ikki fevnd av lógini. Bygningar og verk, sum einans eru ætlaði at hýsa fólki í styttri tíðarbilum, sum eitt nú bússkýli, eru ikki fevnd av lógini. Heldur ikki eru seyðhús, úthús o.t. fevnt av lógini, tí hesi ikki lúka nýtslukravið, sum er fevnt av lógini.

Niðurtøka av bygningum er eisini fevnd av lógini. Endamálið við hesum er at tryggja, at bygningar, sum eru í slíkum standi, at teir antin eru til vanda fyri fólk ella á annan hátt ikki eru brúkbarir til sítt endamál í økispartinum teir liggja í, kunna takast niður. Tað er eigarin av bygninginum, sum skal skipa fyri, at bygningurin verður tikin niður, tá byggimyndugleikin hevur tikið avgerð um niðurtøku.

**Til § 3**

Ásetingin er ein sonevnd heimildaráseting, sum ger tað møguligt at áseta reglur innan tey ymisku økini, sum hava við bygging at gera. Ætlanin er fyrst at seta í gildi kunngerð um tetting og bjálving fyri at minka um orkutørvin og harvið eisini orkunýtsluna til upphiting av bygningum. Hesar reglur eru liður í at fremja Veðurlagspolitikk Føroya at minka um útlátið av veðurlagsgassum. Í kjalavørrinum koma reglur um onnur øki, sum hoyra byggingini til, soleiðis at tað um stutta tíð verður gjørligt at leggja allar kunngerðirnar saman í eitt regluverk um bygging eins og grannalondini og soleiðis tryggja eina ávísa dygd í framtíðar bygging.

Fordømi um tílíkar ásetingar eru at finna í øðrum londum, eitt nú í Danmark í Bek. Nr. 1353 frá 17. desember 2008, eisini nevnt "BR08", sum nú kallast BR10.

Tey viðurskifti, sum nevnd eru undir pkt. 1-6 eru ikki tømandi. Sostatt kann lógin eisini heimila landsstýrismanninum at áseta reglur um eitt nú nýtslustig, hædd á bygningi, umframt annað sum kann hava ávirkan á tey viðurskifti, sum lógin er ætlað at áseta reglur um. Tó verða lendisásetingar, so sum krøv til bilstøðlar, frástøða í mark, byggistig o.a., sum meir ber brá av lendisplanlegging enn bygging, framvegis ásett av kommununi í byggisamtyktunum. Sum meginregla kann sigast, at tað sum viðvíkur bygninginum frá húsavegginum og inn verður regulerað av byggilóg og kunngerðir við heimild í hesari, meðan tað, sum viðvíkur húsaveggjunum og út, tvs. bilstøðlar, øki uttanum, bygging í mark o.a., framhaldandi verður regulerað í kommunalum byggisamtyktum, sum landsstýrið góðkennir.

Fyri at tryggja at málsøkjabýti løgmans verður virt, verða ásetingar, sum viðkoma og marka uppat málsøki hjá øðrum landsstýrismanni, gjørdar í samráð við avvarandi aðalráð. Hugsað verður her um eitt nú brunaásetingar og ásetingar um innleggingar. Fyri at tryggja, at borgarar og vinna hava eitt samansjóðað heildarregluverk at fyrihalda seg til, er neyðugt, at avvarandi myndugleikar í felag smíða ítøkliga regluverkið, sum skal galda fyri bygging.

Fyri at tryggja gott tvørgangandi arbeiðsstev í reglusmíðinum, er ein tvørgangandi arbeiðsbólkur settur, ein sonevndur verkætlanarbólkur, við umboðum fyri miðfyrisitingina, stovnar undir landinum, kommunurnar og vinnuna. Arbeiðið hjá verkætlanarbólkinum er at evna til uppskot til kunngerðir, sum gerast skulu undir lógini og í framtíðini at mæla til tiltrongdar ábøtur á regluverkið.

**Til § 4**

Kommunali byggimyndugleikin kann, við góðkenning frá landsstýrismanninum, heimila frávik. Henda áseting skal tryggja, at frávik kann gerast eitt nú tá talan er um friðaðar bygningar, um mett verður, at ásetingar í lógini ganga ímóti endamálinum við friðingini. Eisini kann frávik gevast, um serligar umstøður tala fyri hesum. Sum dømi kann nevnast, tá kommunan, grundað á

lendisplanlegging, mælir til at geva frávik til t.d. byggistigið í ávísari útstykking vísandi til smærri útstykkingar.

**Til § 5**
Ásetingin ger greitt, at eitt byggimál verður reist við umsókn, og at tað er staðbundni kommunali byggimyndugleikin, ið hevur heimild at móttaka, viðgera og geva byggiloyvi.

Ásetingarnar í stk. 2 og 3 skulu tryggja, at kommunan fær allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at viðgera umsóknir um bygging. Við tað at talan er um ymiskar bygningar, sum lógin fevnir um, og við tað at talan er um eina lóg, ið skal regulera bygging kring alt landið, kann tað vera ymiskt, hvørjar upplýsingar tann einstaka kommunan hevur tørv á fyri at viðgera eina umsókn. Tískil heimilar stk. 3 tí einstøku kommununi til sjálv at meta um, hvørjar aðrar upplýsingar henni tørvar fyri at viðgera einstøku umsóknina. Stk. 3 gevur eisini kommununi rásarrúm til at áseta krøv til tekningar, frágreiðingar og útrokningar, og at umsóknir skulu latast inn í ávísum talgildum líki.

**Til § 6**
Greinin ásetur reglur um, hvørjar reglur eru galdandi í førum, tá bæði ein góðkend byggisamtykt og henda lóg hava ásetingar um somu viðurskifti.
Sambært seinastu broyting í býarskipanarlógini, sí løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009, er krav um, at allar kommunur í seinasta lagi innan 31. desember 2010 skulu hava góðkendar byggisamtyktir fyri allar bygdir í kommununi. Innlendismálaráðið, sum er góðkennandi myndugleiki, kann tó staðfesta, at nakrar fáar kommunur enn ikki eru komnar á mál við hesum arbeiði.

Innlendismálaráðið metir tað verða av stórum týdningi at tryggja, at somu krøv verða sett til bygging runt landið, tó við virðing fyri tí kommunalu lendisplanleggingini. Byggitøkniligar ásetingar um eitt nú nýtslustig og hædd, sum í dag eru ásettar í byggisamtyktunum, víkja fyri samsvarandi ásetingum, sum verða ásettar við heimild í hesi lóg. Fyri framvegis at virða ta kommunalu lendisplanleggingina, er ásett í § 4, at kommunan kann heita á landstýrismannin um at loyva frávik frá galdandi ásetingum, t.d. nýtslustignum, tá talan er um útstykkingar, har hetta er neyðugt fyri at tryggja haldgóða lendisplanlegging, umframt nýtslu av lendinum.

Sjálv lendisplanleggingin, tvs. økis- og lendisbýtið til sethúsaøki vinnuøki, øki til almennar bygningar, vegir, kloakkering, frástøða til mark o.a., heruppií byggistig, verður framvegis ásett í byggisamtyktunum. Sum áður nevnt, so ásetur henda lóg krøv til bygningin og ikki tað, sum er uttanfyri húsaveggirnar, tí tann parturin kemur undir krøvini í býarskipanarlógini um innihaldið í byggisamtyktunum.

**Til § 7**
Flestu kommunur seta sum krav í góðkendari byggisamtykt, at skrivligt byggiloyvi skal vera útskrivað, áðrenn farast kann undir at byggja. § 7 er tí at meta sum ein staðfestan av tí rættarstøðu, sum longu er galdandi í flestu kommunum og vil annars verða galdandi eisini í teimum kommunum, har slík formkrøv møguliga enn ikki eru sett.

Í stk. 2 er ásett, at um so er at farið verður undir at byggja, áðrenn byggiloyvi er fingið til vega, kann kommunan geva boð um at steðga byggingini.

Sambært stk. 3 er møguligt hjá tí einstøku kommununi at luta eitt byggiloyvi sundur í partar. Hetta verður gjørt, tí tørvur kann vera á at luta lutfalsliga stórar byggiverkætlanir sundur í partar. Lutvís byggiloyvi kunnu tí lógliga útskrivast av byggimyndugleikanum, tá treytirnar fyri at útskriva lutvís byggiloyvi eru loknar.

Í stk. 5 er ásett, at farið skal verða undir at byggja í seinasta lagi 2 ár eftir, at kommunan hevur latið byggiloyvi. Kommunan kann tó áseta styttri freist, sí orðini "í seinasta lagi". Verður ikki bygt innan 2 ár ella innan ta freist, ið kommunan hevur ásett, fellur byggiloyvið burtur. Sambært stk. 7 kann kommunan eisini áseta freist fyri, nær byggingin skal verða at enda komin. Kommunurnar hava víst á, at tað kemur fyri, at farið verður undir at byggja, men at byggingin steðgar upp. Ásetingin skal lofta hesum trupulleikanum.

**Til § 8**
Grein 8 staðfestir, at tær treytir, sum eru ásettar um byggiloyvi í hesi lóg ella við kunngerðum, sum hava heimild í hesi lóg, eisini eru galdandi í teim førum, har eingin góðkend byggisamtykt enn er í eini kommunu. Sum nevnt omanfyri, hava flestu kommunur í landinum í dag góðkenda byggisamtykt, men nakrar vanta enn at verða gjørdar og góðkendar.

**Til § 9**
Greinirnar 9-14 innihalda ásetingar um eftirlit, sýning o.a. av bygningum.

Fyri at tryggja, at ásetingar í hesi lóg, og ásetingarnar ásettar við heimild í hesi lóg, verða hildnar, verður heimilað kommununi at hava eftirlit við, at bygt verður eftir lóggávuni. Eftirlit skal havast við øllum bygningum. Eftirsum eftirlitið verður framt við sýning, sbr. viðmerkingunum til § 10, er neyðugt hjá eftirlitsmyndugleikanum at fáa atgongd til allar bygningar. Ásetingin um atgongd er ásett í stk. 2.

**Til § 10**
Grein 10 áleggur eigara av bygningi at boða eftirlitsmyndugleikanum frá beinanvegin, arbeiðið at byggja er liðugt. Kommunala byggieftirlitið verður framt við sýning og sýningin skal gerast í seinasta lagi 4 vikur eftir, at fráboðan er komin til kommununa um, at byggiarbeiðið er liðugt.

Ásetingin í stk. 3 er ásett fyri at tryggja, at kommunala byggieftirlitið ikki við dráli kann forða eigara at taka ein bygning í nýtslu stutta tíð eftir, at bygningurin er liðugur ella umvælingararbeiðið er gjørt. Fýra vikurs freistin byrjar at renna, tá fráboðanin um liðugtgerð er komin fram til kommununa.

**Til § 11**
Eigarin hevur ábyrgd av húsinum ella bygninginum og at bygningurin lýkur tey krøv, sum eru ásett í lóggávuni. Tí er tað eisini ábyrgd eigarans, at møguligir feilir ella manglar verða fingnir í rættlag ella neyðugar ábøtur gjørdar, tá eftirlitið hevur staðfest slíkar við sýning.

**Til § 12**
Greinin heimilar eftirlitsmyndugleikanum at kanna bygningar, um eftirlitsmyndugleikin sjálvur ella onkur annar, t.d. ein granni, ger vart við, at tað sum bygt er, ikki er í samsvari við lóggávuna.

Staðfestir eftirlitsmyndugleikin viðurskifti, sum ikki eru í samsvari við galdandi reglur, skal eigarin hava boð um hetta við tilskilan av, hvørjar bøtandi atgerðir eigarin skal fremja fyri at rætta feilir og manglar í bygninginum. Ger eigarin ikki eftir boðunum innan ásettu freistir frá kommunala byggieftirlitinum, kann eftirlitsmyndugleikin lata arbeiði gera fyri eigarans rokning ella í ringasta føri, at taka bygningin niður, sbr. § 2, stk. 3.

**Til § 13**

Greinin ásetur, at ein bygningur ikki kann takast í nýtslu fyrr, enn sýningin er framd og staðfest er, at bygningurin lýkur lógásett krøv. Tá sýningin er liðug og bygningurin staðfestur sum lógliga bygdur, kann eftirlitsmyndugleikin útskriva eigaranum nýtsluloyvi, sbr. viðmerkingarnar til § 10.

Eftirlitsmyndugleikin kann í ávísum førum útskriva nýtsluloyvi, hóast øll byggingin ikki er liðug. Tørvur kann vera á hesum, tá talan eitt nú er um stórar verkætlanir, har bygt verður í stigum, sbr. viðmerkingarnar til § 7, stk. 3. Tílíkt fyribils nýtsluloyvi er sambært stk. 4 tó treytað av, at eftirlitsmyndugleikin kann staðfesta, at tað sum liðugt er, er bygt í samsvar við galdandi reglur.

**Til § 14**
Greinin gevur eftirlitsmyndugleikanum heimild at krevja, at viðurskifti, sum ikki sampakka við ásetingarnar í hesi lóg ella við ásetingar, ásettar við heimild í hesi lóg, verða fingin í rættlag.

Eftirlitsmyndugleikin skal geva eigaranum skrivlig boð um neyðugar ábøtur skulu gerast, og eisini áseta eina freist fyri, nær ábøturnar skulu verða gjørdar í verki. Freistin verður ásett grundað á eina meting av, hvussu langa tíð tað tekur at fáa møguligar feilir ella manglar rættaðar.

Er freistin farin og eftirlitsmyndugleikin kann staðfesta, at bygningurin framvegis ikki er í lógligum standi, kann eftirlitsmyndugleikin gera av at seta nýggja freist. Hetta eigur tó einans at verða gjørt, tá eigarin kann vísa á, at talan er um óvæntað viðurskifti, sum hava verið atvoldin til, at tað ikki var møguligt at halda ásettu freistina. Slíkar umstøður kunnu eitt nú verða vantandi tilfar, veðurlíkindi, tørv á arbeiðsmegi ella tílíkt, sum eigarin ikki sjálvur hevur havt ávirkan á.

**Til § 15**
Tað verður heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur fyri endurrindan av útreiðslum, sum standast av hesi lóg. Hesi gjøld viðvíkja bæði eftirliti og umsiting. Sum dømi um gjøld kann nevnast gjald fyri viðgerð av byggiumsókn, sum skal latast kommununi. Gjøldini verða ásett, so tey verða eins í øllum kommunum. Støddin á gjaldinum verður ásett út frá einari meting av tí umsitingarbyrðu, sum kommunurnar fáa av lógini og reglum, ásettar við heimild í lógini.

Tað verður eisini heimila landsstýrismanninum at áseta gjald fyri endurrindan av útreiðslum, sum kommunali eftirlitsmyndugleikin hevur í sambandi við umsiting og eftirliti eftir hesi lóg og reglum ásettar við heimild í lógini. Gjaldið verður ásett út frá roynveruligu útreiðslunum, sum kommunan hevur av lóggávuni. Um ein kommuna keypir sær tænastur frá privatum fyritøkum til at útinna partar av eftirlitsuppgávunum, t.d. at gera eina tættleikakanning, so kann gjald eisini takast fyri slíkar útreiðslur, men kostnaðurin skal tá ikki ásetast hægri, enn um kommunan sjálv loysti uppgávuna.

**Til § 16**
Ásetingin ásetur kæruheimildir eftir lógini. Kærufreistin er 4 vikur, sum er vanlig innan fyrisitingina. Málsføri kærumyndugleikin er Kærunevndin í lendismálum, sum útinnir sítt virksemi hjá Føroya Kærustovni.

Kærunevndin í lendismálum umsitur frammanundan kærumál viðvíkjandi býarskipanarlógini og lógini um matrikulering. Mett verður, at nevndin hevur neyðugan sakkunnleika til eisini at viðgera kærur við heimild í hesi lóg ella ásetingum ásettar við heimild í hesi lóg.

Í stk. 2 er ásett, at ein kæra hevur við sær steðgandi virknað. Hetta merkir, at ein avgerð, sum er kærd, ikki kann fremjast fyrr enn avgerðin frá kærumyndugleikanum hevur staðfest avgerðina.

Fyrisitingarlig sektaruppskot, sum eru heimilað eftir grein 18, kunnu ikki kærast til Kærunevndina í lendismálum. Hetta tí, at sektaruppskot er eitt revsirættarligt amboð. Í málum har fyrisitingarligt sektaruppskot er lagt fyri tann, ið hevur brotið lóggávuna, verður málið latið ákæruvaldinum til rættarsókn, um viðkomandi ikki játtar seg sekan og rindar bótina í sektaruppskotinum innan ásettu freistina.

Sambært stk. 3 eru avgerðirnar hjá Kærunevndini í lendismálum endaligar innan fyrisitingina. Hetta merkir, at avgerðir hjá Kærunevndini ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, men mugu skjótast inn fyri dómsvaldið. Við ásetingini er aðalreglan um tvær óheftar fyrisitingarligar viðgerðir, tryggjað.

**Til § 17**
Vanliga revsingin fyri lógarbrot eftir hesi lóg og kunngerðum ásettar við heimild í lógini er bót og ikki fongsulsrevsing, óansæð um talan er um likamligar persónar ella løgfrøðiligar persónar.

Eisini ein kommuna, ein felagsskapur, ein landsstovnur ella onnur, sum lata bygningar byggja, koma sum eigarar av bygningum undir somu reglur, eins og onnur.

Revsingin verður fyrst og fremst áløgd eigaranum av bygninginum. Heimild er eisini at ábyrgja tí, sum hevur bygt bygningin, um viðkomandi visti ella átti at vita, at byggingin ikki er gjørd í samsvari við lóggávuna. Talan er um eina yrkisliga revsiábyrgd fyri ikki at lúka lógásett byggikrøv, sbr. § 1, stk. 1.

Sambært stk. 4 kunnu framleiðarar av byggitilfari og øðrum tilfari, sum er ætlað til bygningar, eisini revsast, um tilfarið ikki lýkur lógásett krøv.

**Til § 18**
Ásetingin heimilar landstýrismanninum ella øðrum, ið landsstýrismaðurin heimilar, at geva fyrisitingarligt sektaruppskot fyri brot á reglur givnar við heimild í hesi lóg. Fyrimunurin við eini sektaruppskotsskipan er, at mál um lógarbrot kunnu verða avgjørd uttanum dómsvaldið og kunnu hesi mál tí avgreiðast væl skjótari, enn um øll mál skulu avgreiðast sum politimál og síðani leggjast fyri dómsvaldið til endaliga støðutakan.

Leisturin við fyrisitingarligum sektaruppskoti verður eisini brúktur í aðrari lóggávu, eitt nú í løgtingslóg nr. 55 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum.

Fyri at tryggja eitt javnt støði fyri ásetan av bót fyri lógarbrot, óansæð hvar í landinum bygningurin stendur, verður uppgávan at orða og umsita fyrisitingarlig sektaruppskot væntandi løgd til ein stovn undir landsstýrinum. Mett verður, at Landsverk hevur neyðugan førleika at átaka sær hesa uppgávu. Fyri at tryggja dygdargóða eftirkanning og rættarsókn eftir hesi skipan er neyðugt, at kommunali byggimyndugleikin kannar øll brot á lóggávuna væl og at kommunali byggimyndugleikin, saman við Landsverki, ítøkiliga eyðmerkir og lýsir framd lógarbrot og revsirættarligu avleiðingarnar í fyrisitingarliga sektaruppskotinum, áðrenn hesi verða løgd fyri borgaran við freist fyri støðutakan.

Ásetingin tryggjar, at allir borgarar verða viðgjørdir eftir sama leisti, tá talan er um at revsa brot eftir lógini ella eftir kunngerðum, ásettar við heimild í lógini. Rættartrygd borgarans í revsimálum, sum er kjølfest í rættargangslógini, verður varðveitt, sbr. stk. 3.

Verður eitt fyrisitingarligt sektaruppskot góðtikið, endar rættarsóknin, sbr. stk. 4. Verður eitt fyrisitingarligt sektaruppskot hinvegin ikki góðtikið, verður málið latið ákæruvaldinum til rættarsókn.

**Til § 19**
Í hesi grein er heimild at áseta neyvari reglur um bótastødd fyri brot á regluverkið. Heimild er at áseta ávísar bótastøddir fyri eitt nú at taka ein bygning í nýtslu, áðrenn nýtsluloyvið er latið sambært § 13.

Bótastøddin skal ásetast í mun til, hvussu groft lógarbrotið verður mett at vera í mun til heilsu, trygd og umhvørvi. Tað eigur eisini at avspeglast í bótastøddini, um talan er um at revsa ein borgara fyri brot á reglurnar um sethúsabygging ella eitt vinnuligt virki fyri brot á reglurnar um vinnubygningar o.s.fr. Bøturnar til síðstnevndu eiga at verða lutfalsliga hægri enn til fyrstnevndu.

**Til § 20**
Gildiskoman er ásett til 1. august 2011. Á henda hátt fáa borgarar, vinnurekandi innan bygging og kommunur eitt hóskandi skotsbrá at kunna seg um nýggja regluverkið og gera neyðugar tillagingar og fyrireikingar fyri at lúka nýggju lógarkrøvini.